# Ein guide er gott hugskot



Undirhaldandi og informativir, álítandi og professionellir við við staðligari og up-to-date vitan, gera Blue Badge Tourist Guides eina góða uppliving til eina framúr uppliving. Tað lovar Blue Badge Guide í hvussu er á heimasíðu síni. Og vit kunnu bara mæla til, at fáa sær ein slíkan guide, tí hesi eru útbúnir ferðaleiðarar, sum veruliga gera ein túr informativan og áhugaverdan. Upplæringin er umfatandi og eksamian strong, so tað er ikki bara sum at siga tað at fáa eina slíka útbúgving. Eisini verður lagdur stórur dentur á, at guidin tosar tungumálið hjá ferðafólkunum, sjálvt um tað helst verður trupult at finna ein, sum tosar føroyskt. Skipað verður fyri øllum sløgum av útferðum, gongutúrar (har mugu vit altso viðmæla góðar gonguskógvar) sigth-seeing við bussi, museums- og gallarívitjanir. So vilt tú hava sum mest burtur úr Londonvitjanini, er tað eitt gott hugskot við guide.




















